# Sigmundur Brestisson avdúkaður við Vesturkirkjuna í Havn



*Listarmaðurin, Hans Pauli Olsen saman við Bárði Jákupsson, listamálara*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Sjúrður Poulsen, kirkjuráðsformaður, avdúkaði nýggju standmyndina uttan fyri Vesturkirkjuna eftir gudstænastuna í gjár, annan hvítusunnudag**

STANDMYND
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er listarmaðurin, Hans Pauli Olsen, sum hevur gjørt nýggju standmyndina í kirkjulundini vestan fyri Vesturkirkjuna.

Rað er ráðið, ið skipaði fyri 1000-árahaldini til minnis um kristningina av Føroyum, sum í januar í 2001 tók avgerð um at biðja Hans Paula Olsen gera tríggjar standmyndir av Sigmundi Brestisson. Allar skuldu setast upp í teimum plássum í Føroyum, sum høvdu samband við Sigmund Brestisson og kristniboðan hansara. Ein er tí sett upp í Skúvoy, ein í Havn og ein í Sand ík – og allar vórðu avdúkaðar í dag, annan hvítusunnudag.

Nógv fólk var í kirkju í Vesturkirkjuni í gjár, og veðrið var av tí allar fagrasta til hátíðarhaldið uttan fyri kirkjuna beint eftir gudstænastuna, tá Sjúrður Poulsen, kirkjuráðsformaður avdúkaði standmyndina.

Havnarkórið sang eisini »Boðar tú til allar tjóðir« og at enda tjóðsangin.

Eftir hátíðarløtuna varð boðið til kaffi í kirkjukjallaranum.



*– Sigmundur sleppur kappanum... Tað var Sjúrður Poulsen, kirkjuráðsformaður, sum avdúkaði standmyndina uttan fyri Vesturkirkjuna í Havn annan hvítustunnudag*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Nógv fólk var til gudstænastuna í Vesturkirkjuni, har tey lýddu á báðar prestarnar, Berg D. Joensen og Hera Joensen. Eftir gudstænastuna varð standmyndin av Sigmundi Brestisson avdúkað*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Sigmundur Brestisson komin til heiður og æru í Sandvík

**Rættiliga fitt av fólki var samankomið í góðveðrinum í Sandvík í gjár, har minnisvarði yvir Sigmund Brestisson varð avdúkaður**

MINNISVARÐI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hátíðardagur var í Sandvík í gjár, annan hvítusunnudag, títá var loksins minnisvarðin yvir Sigmund Brestisson avdúkaður, eftir at hann hevur verið í umbúna í fleiri ár.

Dagurin byrjaði við gudstænastu, sum Hans Jacob Joensen, biskupur, helt í Sandvíkar Kirkju.



*Minnisvarðin er júst avdúkaður og fólkið syngur tjóðsangin. Frá vinstru eru tað Niclas Foldbo, Niclas SIgurheim og Hans Jacob Joensen. Minnisvarðin er ein nýggj ímynd av Sandvík. Í baksýninum hómast lítla Dìmum, sum í allar tíðir hevur verið ein ímynd av Sandvík*

Aftaná var farið oman til minnisvarðan, sum Hans Pauli Olsen hevur evnað til.

Tað er nevndin, ið skipaði fyri 1000 ára haldinum fyri kristniboðanina í Føroyum, sum hevur tikið stig til at reisa tríggjar minnisvarðar yvir Sigmund Brestisson, ein í Skúvoy, har hann traðkaði sínar barnaskógvar, ein í Havn, har hann fyrstu ferð kom á land sum kristin, og ein í Sandvík, har hann varð hálshøgdur.

Niclas Foldbo í 1000 ára nevndini, segði, at nevndin vildi hava at okkurt varandi minni kom at standa eftir 1000 ára haldið.

Hetta varðandi minnið skuldi vera ein minnisvarði yvir Sigmund, ið var fyrsti trúboðari í Føroyum, tí hann var tað grundleggjandi, størsta og ríkasta við hesum 1000 ára haldinum.

Men nevndin gjørdi so at, at tað skuldi tríggir minnisvarðar gerast á teimum plássum, ið hava serligan týdning fyri lívsleið Sigmunds. Og tað eru so hesir tríggir minnisvarðarnir úrslitið av. Umframt at teir tríggir minnisvarðarnir vísa hvør sítt myndevni, hava teir allir tríggir eisini eitt felags merki og tað er eitt víkingaskip, sum vísir, at tað var við einum slíkum fari, at Sigmundur kom higar til lands við kristniboðskapinum.

Við Minnisvarðan í Sandvík sungu fólk, "Boðar tú til allar tjóðir", áðrenn Niclas Sigurheim, formaður í kirkjuráðnum, avdúkaði minnisvarðan.

Síðani varð tjóðsangurin. Eftir hátíðaraldið fór fjøldin í bygdarhúsið í Sandvík, Ranhøll, har kirkjuráðið og Kommunan bjóðaði ein drekkamunn.

Á aðrari síðuni á minnisvarðanum er bronsumynd av Sigmundi, har hann kemur svimjandi inn eftir fjørðinum og á hinari síðuni er víkingaskip, sum mann sær niður á.

Báðar myndirnar eru heldur smáar afturímóti tí stóra steininum, men tað skal helst ímynda, hvussu lítil maður og bátur eru á tí stóra havi.....